Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Arbeiðsmegin hjá Atlantsflog

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um Atlantic Airways raðfestir bíliga útlendska arbeiðsmegi fram um royndar føroyskar umsøkjarar?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa um starvsfólkakostnaðir til flogskiparar og flogternur frá 1. januar 2021 til 1. oktober 2021 í mun til sama tíðarskeið í 2019?

Viðmerkingar:
Atlantsflog er okkara tjóðarflogfelag og eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum.

Undir koronukreppuni, sum rakti flogvinnuna hart, varð avgjørt at seta 100 mió. kr. aftrat í almenna flogfelagið við eykajáttan. Hetta fyri at felagið skuldi koma betur burtur úr kreppuni. Undir viðgerðini í Løgtinginum førdu fleiri tingfólk fram, at treytin fyri íløguna var, at felagið setti føroysku starvsfólkini aftur í starv, sum høvdu mist starv sítt orsakað av minkandi flogferðslu. Landsstýrismaðurin varð kunnaður um hetta ynskið.

Nú er stórur vøkstur í flúgving til Føroya og eisini hjá Atlantsflog. Hetta er gleðiligt. Røddir eru tó frammi í fjølmiðlunum um, at onnur bíligari arbeiðsmegi verður sett í størv, sum føroyingar mannaðu frammanundan koronukreppuni, hóast føroysku starvsfólkini eru tøk.

Atlantsflog hevur altíð verið eitt føroyskt felag, sum vit eru errin av. Einamest tí, at leiðsla og flestu starvsfólk eru dugnaligir føroyingar við hollum royndum - bæði á landi og í luftini. Um bílig útlendsk arbeiðsmegi verður raðfest, kann mann ímynda sær, at tað verður fremmandamál, sum fer at mynda flogtúrin í framtíðini, hóast talan er um okkara tjóðarflogfelag. Fyri at fáa greiðu á hesum, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 24. november 2021

Jóhannis Joensen